# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*26. apríl fingu Bárður 6 ár og Randi 1 ár eina lítlasystur. Hon vigaði 3650 gr og var 51 cm long. Foreldur teirra eru Hansina M. og Sonni Johannesen og tey búgva í Saltangará.*



*30. apríl fingu Ása og Dina ein lítlabeiggja. Hann var 51 cm langur og vigaði 4100 gr. Hann eitur Pól Jóhannus eftir einum av abbum sínum. Foreldur teirra eru Kristina og Páll Larsen í Fuglafirði.*



*Leygardagin 1. mai fingu Mildrid Einarsdóttir og Hanus Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4300 gr. Her sita systrarnar Sanna, Masa og Rósa so erpnar undir honum.*

28. apríl fingu Brynhild Nolsøe og Ysmhael L. Thorgeirsson, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3050 gr.

28. apríl fingu Eydna Dánjalsdóttir Petersen og John Vangberg Petersen, Norðragøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

29. apríl fingu Pencae og Bjarki Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

29. apríl fingu Katrin Jespersen og Bárður Mikkelsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3195 gr.

30. apríl fingu Helga Nordendal og Gunnar K. Nattestad, Bø, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3700 gr.

1. mai fingu Jacoba Lervig og Bergur Samuelsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4500 gr.

1. mai fingu Sólrun Lenvig og Stig Hansen, Argjum, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

2. mai fingu Dorith Æðustein Poulsen, Tórshavn, og Niclas Allan Danielsen, Toftum, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3200 gr. Hon eitur Erika.

2. mai fingu Jóhanna og Heðin Poulsen, Skála, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

3. mai fingu Nina og Petur Poulsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3000 gr.

3. mai fingu Sára og Bjørk í Århus eina lítlasystur. Hon var 53 cm long og vigaði 3960 gr. Foreldrini eru Ane Bogetoft Drost og Rólvur Berg.

Erla Olsen, Vestmanna:

## 25 ára starvsdag í Vestmanna kirkju



Leygardagin 8. mai eru 25 ár liðin síðan Erla Olsen var sett sum organistur í Vestmanna.

Øll hesi árini hevur hon uttan íhald røkt hetta starv og undir skiftandi kirkjuráðum og prestum.

Hesi 25 árini hava Jákup Magnussen, Gerhard Hansen, Uni Næs og Inga Poulsen Dam verið prestar.

Erla, sum annars er útbúgvin hárfríðkannarkvinna byrjaði í 1979 við barnakóri í kirkjuni, og góvu tey eisini band út um tað mundi. Nú um páskirnar sendi SVF eina sending við Vestmanna Kirkjukóri, har Erla eisini er kórleiðari.

Erla er gift við Julian Olsen, tey búgva inni við Fossá og tey eiga børnini: Andrea, 39 ár, Finn Jørgin, 38 ár, Ingi, 35 ár, Eivind, 33 ár og Áki, sum er 27 ár.

Kurt Andersen, Saltangará:

## Linjumaður hjá elfelagnum SEV í 25 ár



9. mai hevur Kurt Andersen, Saltangará arbeitt sum linjumaður hjá elfelagnum SEV í Eysturoynni í 25 ár.

## Grønkast á Eiðinum



**Nú er komið væl áleiðis við nýggja vøllinum á Eiðinum í Vági og menn eru byrjaðir at leggja grønu grasrullurnar á**

FÓTBÓLTSVØLLUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

VB hevur í ár leikt sínar heimadystir á Sevmýri á Tvøroyri og orsøkin er, at farið varð fyrr í ár undir stórarbeiði vesturi á Eiðinum í Vági. Gamli fótbóltsvøllururin skuldi skiftast út og farið varð gjølla til verka. Nýggi vøllurin er nýggjur frá botni av. Økið er planerað av nýggjum og liggur nýggi vøllurin væl hægri enn tann gamli. Eisini er snøggað rundan um vøllin.

Nýggi vøllurin er av nýggjasta slag og menn frá útlendsku fyritøkuni fáast um dagarnar við at leggja grønu grasrullurnar á og arbeiðið gongur væl og skjótt. Myndin vísir vøllin fyrstu dagarnar í vikuni, men veðrið var heldur keðiligt týsdagin og mikudagin, so tá lá arbeiðið stilt, men var tað tikið uppaftur hósdagin.

**-do-**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Smiðjan í Lítluvík



Hósdagin 6. mei kl 14, verður fernisering av eini nýggjari listaframsýning í smiðjuni í Lítluvík.

Tað verður danski listamálarin Ingrid Møller, sum fer at sýna fram verk úr Føroyum. Hon hevur nýtt bæði akryl, oliepastel, akvarel og silkimáling.

Ingrid Møller hevur fleiri ferðir verið í Føroyum, og eitt skifti búði hon eisini her. Hon hevur fyrr havt framsýning í Lítluvík.

Hon sigur, at myndirnar endurspegla hennara kærleika til oyggjarnar og føroysku náttúruna, og tær eru ein háttur at halda fast um minnini. Myndirnar eru fyri tað mesta naturalistiskar, men tær vísa eisini sterku sansaupplivingarnar, sum Ingrid Møller hevur fingið her.

Framsýningin verður 6.-16. mei, kl 14-18.30.

## Andlát

29. apríl
Sunnuvá Hansen, Miðvági, 80 ár.

1. mai
Manda Andersen, fødd Jacobsen, ættað úr Fámjin,82 ár.

2. mai
Niclas Petur Niclassen, ættaður av Velbastað, búsitandi í Havn,73 ár.
Birgir Hansen, Fuglafirði, 63 ár.
Hildibjørg Tausen, ættað úr Fámjin, 53 ár.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd.

## Dagurin

**7. mai. Flavia**, deyð umleið ár 95. Henda abbadóttir keisaran Vespasianus gjørdist kristin og varð rikin í útlegd.

**8. mai. Stanislaus**, deyður í 1079. Biskupur í Krakow. Hann varð tikin av døgum, tí hann hevði at konginum Boleslav. Hann er tjóðarhalgimenni hjá póllendingum.

**9. mai. Kaspar**. Ein av teimum tirmum heilagu kongunum. Føroyska navnið er Jaspur, týdningurin er ókendur.

**10. mai. Gordianus**, deyður umleið ár 362. heiðin rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og varð hálshøgdur.

## 90 ár

10. mai verður Jütta S. Jacobsen á Bakka, Glyvrum, 90 ár.

Dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum Dýra biðidag 7. mai. Opið hús frá kl. 17.00

## Konfirmantar í Miðvágs kirkju í 1958



Konfirmantar í Miðvágs kirkju 30. mars 1958 hjá Johs. Follend, presti.

Sunnudagin 30. mars 2003 hittust hesi 18 til gudstænastu í Miðvágs kirkju í sambandi við, at tað vóru 45 ár síðani tey vórðu konfirmerað.

Aftasta rað f. v.: Julius Henriksen, Sørvági, Snorri á Steig, Sandavági, Egin Rasmussen, Sørvági, Sommer Jacobsen, Vestmanna (Slættanesi), Petur Petersen, Sandavági, Ólavur Guttesen, Sørvági (Bøur).

Í miðjuni f.v.: Lis Ehlers, Sørvági, Marna Olsen, Hoyvík (Dam, Sandavági), Oda Olsen (Davidsen) Sørvági, Edith í Jansagerði, Miðvági, Anna Højsted, Hoyvík (Eliasen, Slættanesi), Herborg Thomassen, Sørvági (í Kálvalíð, Miðvági).

Fremst f.v. Inna Müller, Tórshavn (Nattestad, Miðvági), Erla í Haraldsstovu, Tórshavn (Sandavági), Sára Heinesen, Sørvági (Guttesen, Bøur), Julia Biskopstø, Danmark (Kongsbak, Miðvági), Arnfríða Nielsen, Tórshavn (Augustinussen, Sandavági) og Jónrith Frederiksen, Miðvági (Petersen, Sandavági).

Prestur var David Johannesen.

Upprunaliga vóru 25 konfirmantar, men 6 vóru ikki við, og ein er deyð.

Nú nærum øll hava rundað tey seksti árini, er ein á myndini, sum ynskir øllum hjartaliga tillukku og takkar fyri ein hugnaligan dag 30. mars 2003.

## Tøkk




Øllum tykkum, ið gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin tann 14. februar so hugnaligan, takka vit hjartaliga.

Takk fyri gávur, blómur, telegramm, uppringingar, og takk til børn og svigarbørn, sum fingu dagin í lag.

**Alma og Jóhan**
**Louisa og Kristian**